# Støðan tykist kaot

**Óli Jacobsen, sum hevur verið við og hevur fylgt samráðingum millum manningarfeløg og reiðarar í eini 40 ár, hevur ongantíð áður upplivað, at sáttmálaviðurskiftini hava virkað so kaotisk sum í løtuni, nú líkt er til, at Føroya Reiðarafelag hevur mist kontrollið, sum hann tekur til**

Vilmund Jacobsen

Støðan á sáttmálaøkinum millum reiðarar og manningarfeløg er rættiliga ógreið í løtuni, nú einstøk skip og skipabólkar eru farin í beinleiðis samráðingar við manningarfeløg um serstakar avtalur.

Óli Jacobsen, sum var formaður í Føroya Fiskimannafelag í ein mansaldur og annars hevur fylt samráðingum millum reiðarar og fiskimenn seinastu 40 árini, sigur, at hann ongantíð áður hevur upplivað, at støðan hevur soleiðis, sum hon tykist vera beint í løtuni.




*Óli Jacobsen heldur, at tað í løtuni tykist, sum um Føroya Reiðarafelag við Vibergi Sørensen sum formanni er við at fara í upploysn*

Mynd: Vilmund Jacobsen



*- Eg haldi ikki, at hetta er ein ynskistøða hjá nøkrum av pørtunum, sigur fyrrverandi formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Óli Jacobsen, sum ongantíð áður hevur upplivað slíkt rumbul á sáttmálaøkinum*

- Vit hava hoyrt um skip, sum hava gjørt sáttmála við manningarfeløgini, og í dag verður fundur millum Felagið Nótaskip og manningarfeløgini. Líkt er til, at Føroya Reiðarafelag hevur mist tamarhaldið á støðuni, og okkurt bendir á, at Viberg Sørensen sum formaður hevur spælt fallit, sum Óli Jacobsen tekur til.

Fyrrverandi formaðurin í Føroya Fiskimannafelag dugir í løtuni ikki at síggja, at rumblið, sum nú er íkomið á sáttmálaøkinum, tænir nøkrum parti til heiðurs.

- Nei, eg haldi ikki, at hetta er nøkur ynskistøða fyri nakran av pørtunum, hvørki fyri reiðarar ella manningarfeløg. Tað er ongantíð gott, tá viðurskiftini ikki eru í skipaðari legu, og tað er ongantíð gott, tá tú ikki veitst, hvør mótparturin er.

Óli Jacobsen hevur fylgt gongdini í gjár og í morgun, og hann heldur, at rættiliga trupult er at siga beint í løtu-

# Uppgávan at samráðast er endað

**- Nevndin í Reiðarafelagnum er komin til ta niðurstøðu, at hennara uppgáva at samráðast vegna limirnar er endað, sigur felagið, nú Norðborg hevur gjørt undirhondsavtalu við manningarfeløgini**



Vilmund Jacobsen

Seinnapartin í gjár hevði Føroya Reiðarafelag limafund, har støðan við sáttmálaloysinum millum reiðarar og manningarfeløg var til viðgerðar.

Á hesum fundi fingu reiðarar høvi at siga sína hugsan, og sambært heimasíðuni hjá Reiðarafelagnum bakkaðu teir, sum í fyrsta umfari tóku orðið á fundinum, nevndina í Reiðarafelagnum upp í hennara arbeiði við sáttmálasamráðingunum.

- Men hesin fundur tók eina avgerðandi vend, tá umboð fyri reiðaríið hjá Norðborg boðaði hinum reiðarunum frá, at teir høvdu gjørt undirhondsavtalu við manningarfeløgini um nýggjan sáttmála fyri Norðborg. Hetta kom nevndini og fundinum dátt við, tí hetta er ikki í tráð við tann leist, ið lagt hevur verið upp til í verandi støðu.

Tað sigur Reiðarafelagið á síni heimasíðu eftir limafundin.

Lagt verður aftrat, at við hesi avtalu hava reiðaríið hjá Norðborg og manningarfeløgini frátikið nevndini í Reiðarafelagnum samráðingarrættin.

- Hetta ger, at nevndin í felagnum er komin til ta niðurstøðu, at hennara uppgáva at samráðast vegna limirnar er endað, og at manningarfeløgini heldur ynskja at samráðast við hvørt reiðarí sær.

Á heimasíðu Reiðarafelagsins verður sagt, at henda nýggja støðan ger, at nevndin í felagnum fer at kalla inn til eykaaðalfundar við stytstu freist, har framtíðarstøða felagsins verður til viðgerðar.

- So leingi, sum henda støða er galdandi, frásigur nevndin í Reiðarafelagnum sær uppgávuna at samráðast við manningarfeløgini vegna limirnar. Hetta merkir, at limunum nú stendur frítt at gera sum frægast.

Nevndin í Reiðarafelagnum sigur seg samstundis harmast um, at manningarfeløgini nú ynskja at samráðast við hvørt reiðarí sær.

- Men sjálvsagt fara vit at virða hesa nýggju støðu,